Birthe Weiss, ráðharri í Nyrup-stjórnini:

Stjórnin eigur ikki at undirmeta flyting

Eg skilji væl, at fólkaflytingin er ein stórur trupulleiki í Føroyum. Sleppur hon at halda fram og vaksa er hetta avgjørt nakað, sum eigur at verða viðgjørt undir komandi samráðingunum. Hetta er eitt mál, sum eingin eigur at undirmeta sigur ráðharrin

Birthe Weiss, kirkjumálaráðharri. Mynd: Áki

-Eg skilji væl, at flytingin er ein stórur trupulleiki fyri føroyska samfelagið, ikki minst nú tá heilar familjur, sum hava verið havt stóran týdning fyri føroyska búskapin, nú eisini flyta burtur. Tað er greitt, at slík flyting má fáa avleiðingar fyri búskapin í landinum.

Hetta sigur danski innanríkis- og kirkjumálaráðharrin, Birthe Weiss, sum jú hevur vitjað í Føroyum.

Undir vitjanini hevði hon eisini høvi at hoyra fólk greiða frá trupulleikunum í samfelagnum og viðgongur hon, at fólkaflytingin er eitt av teimum málum, sum fólk kenna sum størstu høttanina.

-Greitt hevur verið frá flytingini, sum er hon ein trupulleiki, og tað dugi eg eisini væl at skilja, at hon er.

Birthe Weiss heldur fyri, at um heldur fólkaflytingin fram og veksur, so er hetta nakað, sum eigur at verða viðgjørt undir komandi samráðingunum millum londini.

-Hetta er eitt mál, sum ein ikki eigur at undirmeta.

Birthe Weiss heldur tó, at tað hevði verið best, um føroyingar sjálvir megnaðu at venda hesi gongd.

Upp á fyrispurning hvat hon heldur um ta kluft, sum er ímillum Føroyar og Danmark, sigur Birthe Weiss, at hon als ikki hevur merkt nakað til "mislyde" millum londini bæði undir vitjanini.

-Fólk hava verið sera opin og fyrikomandi. Hvat viðvíkur mínum øki, sum er kirkjan, hava vit eitt framúr gott samstarv við føroysku fólkakirkjuna.

Hyggið frameftir

-Men nógvir føroyingar halda ikki, at hetta samstarvið er at finna á tí politiska økinum annars. Tú er partur av donsku stjórnini!

-Eg haldi vit ístaðin fyri at grava í, hvat gekk galið, eiga at fyrireika okkum væl til komandi samráðingar í september, tí her eru mál, sum mugu loysast.

-Fer tú at gera tína ávirkan galdandi yvirfyri restini av stjórnini og eisini innan tín egna flokk til tess at ein góð loysn verður funnin undir samráðingunum í september?

-Nú hava míni øki, innanríkis- og kirkjumál ikki nakað við búskaparligu støðuna og viðurskiftini at gera. Men tað er greitt, at tá tú kemur aftur til Danmarkar við inntrykkum og upplýsingum frá eini slíkari vitjan, ið eisini hevur fingið teg at hugsa meira, so blandar tú teg internt so nógv tú kann.

Birthe Weiss sigur annars, at hon unidr vitjanini hevur fingið eina nógv betri fatan av, hvussu tætt knýtt føroyingar eru at náttúruni og her hugsar hon ikki minst um, hvussu altavgerandi havið er fyri fólkið.

Birthe Weiss heldur annars, at tað hevur týdning fyri viðurskiftini millum londini, at danskir politikarar kunnu vitja her og fáa innlit í støðuna.

Nyrup tann besti

Vit spurdu hana, um ikki leiðarin í danska javnaðarflokkinum stendur veikari í dag enn hann gjørdi, tá hann tók við sum forsætisráðharri?

-Tað vil altíð vera upp og niður. Sjálv havi eg verið næstformaður í flokkinum við trimum ymsum formonnum, Anker Jørgensen, Svend Auken og Poul Nyrup Rasmussen. Av teimum er Poul Nyrup heilt greitt tann besti formaðurin.

Hann er ein nógv betri "formidlari" og tað er eitt gott talent at hava sum forsætisráðharri. Fyri tað um vit hava orðaskifti um bygnaðin í flokkinum, at tað er stríðsval um nýggjan næstformanni og tí at hann er við í mótmælunum móti kjarnorku - kann tað skapa turbulent viðurskifti, men hvat so! Tað merkir ikki, at tú sum forsætisráðharrin stendur veikur í flokkinum.

Birthe Weiss vísir aftur, at Poul Nyrup Rasmussen skal hava verið ov seinur at kunna seg við føroysk viðurskifti, nú kreppan tók dik á seg í Føroyum.

Uffe hevði ikki verið góður

Vit spurdu danska ráðharran, um ikki føroyingar høvdu staðið seg betri og havt tað betri við einum Uffa Ellemanna-Jensen sum forsætisráðharra heldur enn Nyrup!

-Nei, tað hevði verið bæði stórt spell fyri danska samfelagið og fyri Føroyar.

Eitt samfelag sum tað danska í dag við teimum møguleikum tað hevur - hevði við Uffe Ellemann-Jensen als ikki viljað vent aftur til tað stigvísa bjartskygni og framgongd, sum vit uppliva í Danmark í dag.

-Nú tú kemur aftur til Danmakar, fer tú so at lýða tínum formanni nøkur góð ráð í oyrað - ráð sum botna í tínum upplivingum og inntrykkum í Føroyum?

-Tað er greitt, at eg fari at gera tað. Eg dugi væl at síggja, at tað verður ein stórur trupulleiki, um tað ikki eydnast at broyta flytingina.

-Ráðini frá summum føroyingum fyri at fáa bilbukt við henda trupulleika er at lækka skattatrýstið, og tað gerst bert við at danska stjórnin góðtekur at niðurfrysta ella sleppa Føroyum undan einum parti av stóru rentubyrðuni av uttanlandslánunum!

-Tað er ikki so, at tað bert finst eina loysn uppá hetta málið. Føroyska samfelagið má eisini koma við uppskotum, hvussu ein kann broyta hesa gongd.

Birthe Weiss heldur tað eisini vera týdningarmikið, at ein ikki bert sigur, at hetta má vera ein partur av eini danskari loysn. Tað er ógvuliga umráðandi, at Danmark er við til at leggja karmarnar. Men teir føroysku trupulleikarnir mugu grundleggjandi loysast av føroyingum sjálvum.

Hetta er sjálvur andin í tí samarbeiði, sum er millum londini.

-Men hevur tú varhugan av, at føroyingar hava verið ov passivir at koma við eini føroyska loysn.

-Tað er ikki tað er sigi. Eg sigi bert, at tað kann ikki vera rætt, at *loysnin* skal koma úr Danmark. Tað er eisini vandamikil hugsunnarháttur.

-Nú er tú innanríkisráðharri. Heldur tú vit hava eina alt ov stóra almenna umsiting í Føroyum?

-Tað kann eg ikki svara uppá, tí til tað kenni eg føroyska samfelagið ov lítið.

jan

Birthe Weiss her á fundi í Føroyum

PIZZARIA
og
SKÁIN
eru opin hvønn dag
kl. 17–23
Harumframt er SKÁIN
opin hvønn leygar- og sunnumorgun
kl. 05–07
Ringið tlf. 18866
og fáið vørurnar sendar til hús